Landssjúkrahúsið
Barnadeildin tel 304500
www.barnadeildin.fo
Email: barnadeildin@ls.fo

Landssjúkrahúsið

Landrásbruni hjá børnum

Hvat er landrásbruni?

Bruni í landrásini kemur oftast av, at bakteriur frá húðini via urinrørið treingja inn í bløðruna. Tað er ein vanligur tilburður hjá børnum og serliga gentum. Umleið 8% av gentum og 1% av dreingjum hava í teirra barnaárum havt landrásbruna. Bakteriurnar eru oftast colibakteriur eller aðrar bakteriur, sum upprunaliga stava frá tarminum. Av tí at urinrørið hjá gentum er so stutt, er vandin fyri landrásbruna størri hjá gentum enn dreingjum. Summar gentur fáa afturvendandi bruna. Oftast er einans talan um bløðrubruna, men um bakteriurnar breiða seg frá bløðruni og longur upp til nýruni, kallast tað nýrakokubruna (da: nyrebækkenbetændelse).

Kanningar?

Til at seta diagnosuna, verður landroynd tikin til stiksprøva , fyri at staðfesta um tekin er til bruna. Brúkar barnið blæu, kann ein posi setast á, innanfyri blæuna. Barnið pissar í posan, og hetta verður kannað hjá kommunulæknanum ella á Barnadeildini. Um stiks er blankt, hevur barnið ikki landrásbruna og nýtist ikki kannast meira. Um útslag er á stiks, bendir tað á bruna og gjøllari kanning má gerast við at senda land til dyrkan.

Hesin prøvin skal takast so reint sum gjørligt, best sum miðstráluland. Miðstráluland fæst við fyrst at pissa nakað, síðan pissa eitt sindur í eitt ílæt og so lata restina fara. Tað kann verða trupult at fáa miðstráluland frá teimum smærru børnunum, men tað er tó neyðugt. Miðstrálulandið verður sent til dyrkan, fyri at staðfesta, hvat slag av bakterium eru í landinum, soleiðis at viðgerðin verður optimal. Tað tekur nakrar dagar, áðrenn svarið uppá dyrkanina er klárt.

Viðgerð:

Bløðrubruni: *verður viðgjørdur við antibiotika mikstur vanliga í 10 dagar. Harumframt neyðugt at geva barninum nógv at drekka, so at landrásin verður skolað væl.*
Landrásbruni smittar ikki – tó er altíð umráðandi at hugsa um gott hondreinføri

Bruni í ovaru landrás (nýrakokubruni): *verður viðgjørt við antibiotika mikstur ella inn í æðrarnar (iv).*
Um byrjað verður við mikstur, skal barnadeildin kontaktast dagliga til fepurin fellur og barnið fær tað betri.
Um barnið ikki batnar innan 2 dagar, kann gerast neyðugt at geva iv antibiotika í staðin fyri mikstur.

Ultraljóð:

Vanligt er at barnið fær gjørt ultraljóðkanning av nýrum og landrás at tryggja at einki tarnar landrenslinum..

Fyribyrging:

Hjálp barninum so at tað fær uml. 1 litur av vætu at drekka um dagin, harav 2/3 áðrenn kl 16. Hetta fyri at sleppa undan, at barnið pissar í song um náttina.

Lær barnið góðar vesivanar, so sum at hava regluligar vesitíðir og at geva sær góða tíð til at tøma bløðruna heilt.

Lær gentur at turka sær frammanífrá og aftureftir.

Barnadeildin
Dato: juli 2018